# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 28. februar 2013, kl. 19$^{00}$.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

John Zachariassen farin av fundinum vegna ógegni.

**Mál 11**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um nýtt tilboð frá Munin upp á ArcGis kortskipan.
J.nr. 2009-370
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 13. februar 2013 nýtt tilboð frá Munin upp á ArcGis kortskipan.
John Zachariassen greiddi frá og svaraði spurningum, man var annars ikki við í viðgerðini.
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum og at seta skipanina í verk beinanvegin.

**Viðv. 11**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

John Zachariassen komin aftur á fundin.

Durita á Heygum farin av fundinum vegna ógegni.

**Mál 12**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Búnaðarstovuni um frábýti av sethúsaøki á matr. nr. 216a.
J.nr. 2009-406
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 13. februar 2013 umsókn frá Búnaðarstovuni um frábýti av sethúsaøki á matr. nr. 216a (sethúsini hjá Heina á Heygum).
Nevndin mælir til at viðmæla frábýtinum.

**Viðv. 12**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Durita á Heygum komin aftur á fundin.

**Mál 13**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013.
J.nr. 2009-499
Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 20. februar 2013 uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013.
Nevndin samtykti at leggja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.

**Viðv. 13**
Pauli T. Petersen mælti til at samtykkja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013. Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.50.

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen